# Reglugerð fyri stuðul til altjóða kappingar í Føroyum

Hendan reglugerð viðgerð treytir fyri at fáa peningaligan stuðul til at skipa fyri altjóða kappingum í Føroyum.

Stuðul kann søkjast til altjóða kappingar, sum ser- og menningarsambond skipa fyri í Føroyum. Sum meginregla skulu hesar treytir verða uppfyltar.

1. Kappingin skal vera á NM-støði ella á líknandi ella hægri støði.

2. Kappingin kann vera fyri junior ella vaksin.

3. Í minsta lagi 4 lond skulu luttaka í kappingini.

4. Í mun til uppsetta fíggjarætlan kann ein undirskotstrygd setast.

5. Uppgerð við skjalprógvum fyri útreiðslurnar skal innlatast ÍSF seinast tveir mánaðir eftir, at kappingin hevur verið.

*Samtykt á starvsnevndarfundi 4. desember 2017, og tillagaður á starvsnevndarfundi 17. oktober 2022, og aftur 30. september 2023.*